# NØVN

SAMBAND
MAGNUS GUNNARSSON
MAGGI@SOSIALURIN.FO
TLF 341800 FAX 341801

*Á hesum síðum bera vit tíðindi um merkisdagar, so sum rundar føðingardagar, brúdleypsdagar, starvssetanir o.t.*

Sámal Midjord:

## Fyrsti logistikatstøðingurin á Landssjúkrahúsinum

Fríggjadagin fyri hvítusunnu var móttøka á goymsluni á Landssjúkrahúsinum, í sambandi við at Sámal Midjord varð útlærdur sum logistikatstøðingur. Hetta er fyrstu ferð at nakar fær hesa útbúgving á Landssjúkrahúsinum.

Sámal er 25 ára gamal og úr Vági. Eftir sum at hann hevði tikið FHS-skeið á Føroya Handilsskúla, tók útbúgvingin 3 ár. Í hesum tíðarskeiði var hann 7 vikur á Mommark Handelskostskole, nærhendis Sønderborg í Danmark.

Útbúgvingin umfatar generella goymslustýring, har hann m.a. hevur lært hvussu ein goymsla verður uppbygd og um ymiskar goymslustýringar. Hann nevnir t.d. at Landssjúkrahúsið koyrir ikki við somu goymslustýring sum Ríkissjúkrahúsið. Meginparturin av veitarunum hjá Landssjúkrahúsinum eru í Danmark, og vanliga leveringstíðin er upp á 1-2 vikur, meðan Ríkissjúkrahúsið hevur meginpartin av sínum veitarum so tætt við, at teir kunnu hava eina minimala goymslu við einari leveringstíð upp á 1-2 dagar, meðan goymlsan á Landssjúkrahúsinum altíð má hava vøruna tøka.



*Óli Arge (h.m.) frá fyrisitingini á Landssjúkrahúsinum handar Sámali Midjord prógvið sum logistikatstøðingur*

*Mynd: Jens Kristian Vang*

Sámal sigur, at hann eisini hevur lært um innkeyp og sølu. Útbúgvingin umfatar eisini tolling av vørum í samband við sølu uttanfyri Danmark. Sámal hevur fingið starv sum logistikatstøðingur á goymsluni á Landssjúkrahúsinum.

*-red*

## Gaither konsert í Keypmannahavn

Sunnukvøldið 18. oktober verður sera forkunnug konsert í Keypmannahavn. Tað eru tey vælkendu Bill & Gloria Gaither, sum við bólki sínum „Gaither Homecoming Friends“ fara at syngja.

Saman við teimum verða eisini mong onnur kend nøvn: Gaither Vocal Band v/Wess Hampton, Michael English, Mark Lowry, David Phelps og Bill Gaither, Signature Sound og Ernie Haase, Lynda Randle, Buddy Greene og Janet Pascal.

Øll hesi, sum eru so vælkend frá sjónvarpinum, verða nú at hoyra og síggja live í Keypmannahavn.

Bert ein konsert verður á hesum sinni. Hon varar í fýra tímar og verður eitt minni fyri lívið.

Faroe Travel skipar fyri ferð til konsertina. Farið verður við flogfari úr Føroyum fríggjakvøldið 16. oktober og heimaftur mánadagin. Skipað verður fyri innivist og bussflutningi í Keypmannahavn. Lýst verður í miðlunum fyrsta dagin. Avmarkað pláss er, men longu nú ber til at tekna seg hjá Faroe Travel.



†

### Andlát og jarðarferðir

**Niels Hansen, Klaksvík**, fer til gravar úr Christianskirkjuni hósdagin kl. 13. Tey, ið vilja minnast Niels, kunnu lata eina gávu á konto í peningastovnunum.

**Dagurin**
**4. juni. Obtatus**, deyður umleið ár 390. Var upprunaliga heiðin maður, sum gjørdist kristin og endaði sum biskupur í Milevis í Numidiu. Hann doyði strádeyðan.

*(Axel Tórgarð: Dagar og nøvn í álmanakkanum, 2. broytta útgáva 2008)*



## Sangløta og ungdómskonsert

Fríggjakvøldið verður ein sangløta í Ebenezer. Húsið verður opið frá kl. 20, so til ber at fara runt í húsinum. Sangløtan verður kl. 21. Umframt sangkórið koma Triple-Trio, Dupultkvar-tettin, Váli og ein gentutrio at syngja. Trý ungfólk fara at spæla hvør sítt klassiskt stykki á violin og cello. Og so verður felagssangur. Aftaná verður bjóðað til ein drekkamunn. Løtan er almenn, og øll eru hjartaliga vælkomin.

Kl. 22.30 verður ein ungdómskonsert á parkeringsøkinum norðanfyri Ebenezer.



**Lesið Sosialin so eru tit við**